Skála-B36 1-1 (0-0):

# Í B36 eru teir serfrøðingar í gó

**Teir á oddaliðnum vóru sera taktiskt tilvitaðir, og tað eydnaðist teimum at koma afturíaftur, hóast teir í steðginum mistu tveir landsliðsspælarar**

SKÁLA-B36
*Jóannes Hansen*

Tað er eyðsýnt, at B36 hevur gott fólk. Men sjálvandi kennist tað aftur, tá ið tveir av lyklaspælarunum ikki eru førir fyri at spæla og báðir í senn mugu geva skarvin yvir.

Soleiðis var tað á dýrdarveðrinum á Skála mikukvøldið, har tað vóru heilt nógvir áskoðarar – av Skála og úr Eysturoynni og eisini úr høvuðsstaðnum. Tá ið liðini komu á vøllin eftir hvíldina, vóru B36 liðformaðurin, Pól Thorsteinsson, og miðvallarin Ingi Højsted ikki at síggja. Teir vóru báðir skaddir, og B36 venjarin hevði umskipað soleiðis, at Fróði Benjaminsen var farin í miðverjuna, og Bárður H. Joensen og Levi Hannsen vóru nýggir á miðvøllinum.

Skála hevði verið eitt vet omaná í fyrra hálvleiki. Teir høvdu bóltin væl meiri, enn gestirnir høvdu. Orsøkin var ikki minst, at B36 einki hevði ímóti, at heimaliðið hevði bóltin á sínari hálvu. Allan Mørkøre var einsamallur á toppinum, og á miðvøllinum, har Ingi Højgaard og Klæmint Matras vóru stóru arbeiðsmenninir, var nógv fólk og tískil trongt.

Á heimaliðnum var Jónhard Frederiksberg einsamallur á toppinum, meðan Bogi Gregersen hevði útgangsstøðu frammarlaga á miðvøllinum og var skjótur fram á toppin, tá ið møguleikin stóðst.

Skála eigur nógvar tryggar bóltspælarar. Sjáldan í Føroyum sæst, at eitt lið kanska einar tjúgu ferðir megnar at flyta bóltin aftur og fram og úr borði og í borð, og at spælararnir hava sjálvsálit at spæla og ikki sparka, hóast teir eru eitt sindur trongdir. Tað gjørdu skálamenn ofta mikukvøldið, men so eigur at verða lagt afturat, at tað longri frammi var torført hjá teimum at spæla seg ígjøgnum tronga og trygga verjupartin hjá B36.

Tá ið B36 fekk fatur á bóltinum var konseptið, at tað skuldi berast skjótt at. Fleiri ferðir royndu teir við longum sendingum fram til Allan Mørkøre, og Bergur Midjord í høgru og Eyðun Højgaard í vinstru bjóðaðu seg til í borðunum fyri at stuðla einsamalla manninum á toppinum. Í 1. hálvleiki var tað einar tríggjar ferðir nær við og næstan, men B36 hevði onga vandamikla skotroynd móti Skála málinum.

Skála hevði tveir møguleikar, sum kundu havt borið mál við sær. Í fyrra førinum royndi Jónhard úr eitt sindur spískum, og í seinna førinum – tað mundi vera besta álopið allar 90 minuttirnar – heilfluktaði Bogi Gregersen eitt sindur úr høgru og í handaru stólparót, og so trillaði bóltnurin eftir málstrikuni aftanfyri Jákup Mikkelsen. Iulian Florescu hevði lagt fint innfyri, eftir at Jónhard Frederiksberg hevði sneitt tveir av og malið um seg sjálvan, áðrenn hann legði í borðið.

### Skála løtan

Fyrra partin av seinna umfarinum var heimaliðið greitt omaná. B36 hevði eitt sindur ilt við at fóta sær, eftir at lyklaspælararnir vóru farnir av vøllinum. Skála tevjaði blóð, og teir gjørdust meiri álopssinnaðir. Bogi Gregersen fór fram á toppin, Pætur Dam




*Skála tevjaði blóð eina løtu eftir steðgin, og hjá B36 stóð nógv á royndunum at halda teimum burturi*

## Skálamenn vóru troyttir

**Í gjár varð roknað við, at Skála málskjúttin varð so mikið vøddaskaddur mikukvøldið, og tað er lítið sannlíkt, at hann verður førur fyri at spæla mánadagin**

SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Málskjúttin hjá Skála til 1-0 var Bogi Gregersen. Sjálvur segði hann eftir dystarlok, at hann líka sum kendi bóltin kitla høvdið, sum næstan er kokurakað! Iulian Florescu hevði sent fríspark innfyri.

Málið skoraði Bogi Gregersen í 67. minutti, og eitt lítið korter seinni noyddist hann av vøllinum. Hann stóð ella lá skaddur, tá ið B36 javnaði. Í gjár roknaðu teir á Skála við, at álopsspælarin var vøddaskaddur, og so er lítið sannlíkt, at hann verður førur fyri at spæla mánadagin, tá ið Skála skal til Runavíkar.

Skála liðformaðurin, Pauli G. Hansen, heldur, at tað sást á avrikinum hesa ferð, at nógvir dystir hava verið á skránni síðstu dagarnar:

– Vit vóru moyrir, og intensiteturin var ikki tann sami, sum tá ið vit spældu móti HB.

*Hvussu við málunum?*

– Vit megna eina ferð enn at fáa mál í deyðbóltsstøðu, og so hevði fluktarin hjá Boga Gregersen í 1. hálvleiki at havt betri uppiborið enn at farið í stólpan og so framvið málstrikuni.

*Hvussu upplivdi tú teirra mál?*

– Vit hugsa kanska ov nógv um at økja til 2-0 heldur enn at binda um tepru leiðsluna. Men tað liggur ikki til okkara at spæla verjukent. Tað er altíð vandamikið at missa á veg í álop. Tað var henda støðan undirstriking av. Eg haldi, at hetta var einasta ferðin í øllum dystinum, at eg var orduliga frammanfyri miðjuna, og teir í B36 vóru framúr effektivir, tá ið teir fingu møguleikan.

*Ert tú nøgdur við úrslitið?*

– Tað er altíð keðiligt at missa, tá ið tú hevur verið á odda. Vit høvdu bóltin meiri enn teir, og vit høvdu fleiri møguleikar, men síðstu løtuna vóru teir kanska meiri drúgvir, so eg haldi, at vit kunnu liva við einum stigi, sigur Pauli G. Hansen, liðformaður hjá Skála.